# Undirbeat á mentanarnáttini




**Fríggjakvøld er mentanarnátt í Havn. Undirbeat verður hetta kvøldið aftaná midnátt, frá 01-04 í Reinsarínum á Tórsgøtu. Tónleikinum syrgja nýggja DJ-duoin Knakkaknæs og nývaknaða DJ-konseptið Unibrow Conspiracy fyri**

Hvat hendir, tá tveir ungir menn sita heima úti á bygd og keða seg? Ikki so nógv. Men eitt, sum kann henda seg at spretta burturúr slíkum hendingaleysum døgum, er spennandi tónleikur. Og tað er júst tað, sum hendi hjá Jan Nystrøm og Rógva Lamhauge eitt kvøldi í Syðrugøtu.

Jan og Rógvi eru ávikavist oddamaður/gittarleikari og trummari í uppkomandi elektrobólkinum Nin10do. Nú manna teir eisini DJ-duoina Knakkaknæs, sum hevði sína debut á Hvonn síðsta mánað.

Teir borðreiða fríggjakvøldið við einum upphitandi blandi av minimalum tekno og hørðum elektro. Hvat var navnið? Knakkaknæs.

Aftaná eina longri pausu fer ungi havnamaðurin Búi Rouch (fyrrverandi McLovin) við endurløddari peppan aftur á pall sum DJ – nú undir nýggja listaheitinum Unibrow Conspiracy.

Søgan sigur, at Búi aftaná enn eina villa nátt í snuskutum barrum datt av á einum vátum bøi, og vaknaði aftur við einum stórum snigili millum eygnabrýrnar. Honum dámdi so væl snigilin sum andlitsprýði, at hann valdi at klistra hann fastan og kalla hann Mogens.

Tað tók bert ein dag, til Mogens tornaði og doyði. Men við tokka til myrkan elektropopp, fabuløst italo-disko, kitsjutan tekno-tronikk og ymiskt bitch bland verður lagt upp til eina størri-enn-lívið sambrýnda dansiveitslu, og minnið um Mogens verður hildið á lívi við kolstift og glimmuri.

Knannaknæs og Unibrow Conspiracy til Undirbeat í Reinsarínum á Mentanarnáttini, fríggjakvøldið 5. juni, frá klokkan 01-04. Kostnaðurin er 80 krónur, aldursmarkið 18 ár.



# Ingun Hansen í Snarskivuni

**Upp undir Mentanarnáttina, hósdagin 4. juni kl. 16, letur listakvinnan Ingun Hansen framsýning upp í Snarskivuni**

Ingun Hansen búði í Havn, til hon var 10 ára gomul, tá hon flutti til Danmarkar saman við foreldrum og systkjum. Síðani hevur hon búð har. Sína listaligu útbúgving hevur Ingun nomið sær á Århus Kunstakademi árini 1988-92 og á Det fynske Akademi 1992-96.

Ingun hevur luttikið í fleiri framsýningum, bæði í Danmark og Føroyum, m.a. tríggjar ferðir í várframsýningum hjá Listasavninum og eisini saman við øðrum donskum listafólkum í Listasavninum.

Umframt at vera virkin listakvinna starvast Ingun sum sjúkrarøktarfrøðingur, og soleiðis er eisini í summar, nú hon er tríggjar mánaðir í Føroyum. Hon býr í Hvalba og arbeiðir sum listakvinna har, umframt at hon starvast nakrar tímar um vikuna hjá Nærverkinum.

- Hetta er ein góð samanseting og góður møguleiki at koma í samband við fólk, sigur Ingun Hansen.

Myndirnar á framsýningini í Snarskivuni eru abstraktar, bæði oljumálningar og vatnlitsmyndir. Nakrar eru málaðar í ár og aðrar eru eldri. Íblásturin fær Ingun m.a. úr náttúruni, bæði tí føroysku og donsku.

Øll eru vælkomin til fernisering í Snarskivuni hósdagin 4. juni 2009 kl. 16



# Opið hús á Lágargarði

**Opið hús á Lágargarði í Havn mentanarnáttina 5. juni frá kl. 15 -18**

Mentanarnáttina 5. juni 2009 er røktar- og umlættingarheimið Lágargarður opið fyri almenninginum frá kl 15-18, har fólk kunnu koma og vitja stovnin, síggja heimið innan og uttan og síggja tey mongu listaverkini hjá 13 kendum listafólkum, ið hanga kring í húsinum. Eisini verður ymiskur tónleikur og møguleiki verður at keypa kaffi og køkur.

Virkisstovan verður opin, og møguleiki verður at síggja, hvat gjørt verður á Virkisstovuni, og at tosa við starvsfólk og búfólk har. Høvi verður eisini at keypa ymiska hondgjørdar lutir, ið búfólk og dagstovnafólk hava evnað til.

Eisini verður ergo/fysioterapiin opin, og greiða starvsfólkini frá, hvat verður gjørt. Møguleiki verður eisini fyri at verða testaður (styrki- og balansutest) og at fáa ráðgeving.

Frá kl. 15.30 -16 syngur Dupultkvartettin í Ebenezer, og frá kl. 16 -16.30 børn frá Musikskúlanum harmoniku og klaver. Frá kl. 17 -18 kemur Albert Isfelt, arkitektur, ið saman við Gudmundi Hansen hevur teknað Lágargarð, at greiða frá húsinum. Tiltakið er alment, og øll eru vælkomin.

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

# Kjólar við Havnará

**Býurin er í veitsluhýri undan Mentanarnáttini. Klokkan 20.00 bjóðar skraddarin, Beinta Vilhelmsen til ókeypis mótasýning framvið Havnará**

Møt í góðari tíð, og tryggja tær pláss til eina heilt serliga uppliving- heilt ókeypis.



Beinta Vilhelmsen Skraddarí hevur eitt unikt uttandura mótashow mentanarnáttina framvið Havnará kl 20.00.

Skraddarin fer at vísa stórar skraddaraseymaðar gallarobur, klassiskar kjólar til øll endamál og lættar summarkjólar í frískum litum.

Salong Shair og Cosméto styla modellirnar og saman seta hesar tríggjar fyritøkurnar í hugnaliga umhvørvinum við Havnará ein serligan dám á Mentanarnáttina.

Harafturat hevur dansibólkurin Hóps eina dansiframførslu, sum er gjørd til endamálið og skal framførast undan sýningini.